# ítróttur

Nr. 228 • leygardagur • 24. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Brøndby skapti sensatiónina

**FCK vóru óhepnir at tapa móti týska Borussia Dortmund, meðan Brøndby í seinasta minuttinum vann sær javnleik í Parma**

UEFA-CUP
*Jákup Mørk*

Spenningurin í Keypmannahavn var stórur hóskvøldið. Í øllum førum hjá teimum í høvuðsstaðnum, sum hava áhuga fyri fótbólti, tí bæði FCK og Brøndby skuldu royna seg móti liðum, sum seinnu árini hava gjørt nógv um seg á europeiska pallinum.



*Zuma sýndi enn eina ferð síni framúrskarandi fótbóltsevni, men FCK mátti kortini taka til takkar við einum teprum tapi í dystinum móti Borussia Dortmund*

## Høvdu spælið

Í Parkini var týska Borussia Dortmund komið á vitjan, og hóast hetta ljóðar sum ein stórur biti, so var skjótt greitt, at FCK so als ongar ætlanir hevði um at geva skarvin yvir uttan víðari.

Bert 40 sekund vóru liðin, áðrenn heimaliðið fyrstu ferð breyt ígjøgnum til baklinjuna og sendi bóltin innfyri, og so var linjan líka sum løgd. Kanska skaptu teir í felagnum hjá Toda ikki so øgiliga nógvar møguleikar, men teir høvdu alla tíðina eitt stórt trýst á týskarunum, sum hóast eina á pappírinum framrættaða uppstilling, vórðu trýstir aftur í verjustøðu. Fleiri ferðir fingu teir fríspark í góðari skotstøðu, og tað var eisini eftir eitt slíkt,a t teir vóru næst við at skora. Jens Lehmenn fekk tó fingraspíssarnar á royndina frá Niclas Jensen, tá hesin royndi at benda upp um múrin og móti nærmara stólpa. Annars varð eitt av hesum fríspørkum framt innan fyri brotsteigarmarkið, men enski Riley dømdi tó fríspark beint uttan fyri markið.

Bert ta einu ferðina var rættuligur vandi á ferð hinumeðin, men norski Jan Derek Sørensen rakk akkurát ikki bóltinum, tá ein heilkiksað týsk skotroynd endaði hjá púra leysa norðmanninum.

## Løgið reytt kort

Beint fyri steðgin stakk ein hending seg upp, sum heilt víst verður ovarlaga í tonkunum hjá teimum í FCK komandi dagarnar.

Eftir nærdyst við Kekkiska risan hjá Dortmund, Jan Koller, varð Christian Poulsen sparkaður, og leikarar frá báðum pørtum tustu yvir, fyri at siga dómaranum sína hugsan um hetta.

Dómarin valdi at geva Christian Poulsen gult kort, meðan Jan Koller fekk ostaskorpuna, men tá Poulsen longu hevði fingið gult einaferð, noyddist eisini hann undir brúsuna.

Hetta tóktist sum ein løgin dómur, tí nærmyndirnar á sjónvarpsskíggjanum avdúkaðu ikki nakra ólógliga ger frá dananum, meðan Koller hinvegin royndi at sparka eftir mótstøðumanninum.

## Orðini hjá Liniker

Tíggju móti tíggju helt dystargongdin frá fyrra hálvleiki fram. Við serstakliga einum væl spælandi Zuma kom FCK fleiri ferðir til baklinjuna, men framvegis restaðu teir stóru møguleikarnir.

Ein slíkan fingu teir í seinna hálvleiki, tá Christian Wörns nýtti hondina í brotsteiginum. Jacob Laursen varð settur at skjóta, men skotið fór himmalhøgt upp um málið.

Dysturin líktist nú alt meira einum málleysum javnleiki, men so var tað, at væl kendu orðini hjá Gary Lineker komu til sín rætt. »Fótbóltur er eitt spæl við 11 monnum í hvør sínum parti, og har týskararnir altíð vinna« segði fyrrverandi enski landsliðsáleypparin, og aftur hesa ferð hann rætt.

Tá 93 minuttir vóru leiktir, slapp Lars Ricken leysur móti málinum. Rune Pedersen vardi í fyrsta umfarinum fyri skotroyndini, men í aðru atløgu fekk Heiko Herrlich sent bóltin í tóma málið.

## Flott hjá Brøndby

Hetta gevur FCK eitt sera torført útgangsstøði undan seinna dystinum móti Dortmund, har teir nú verða noyddir at vinna, um teir skulu koma víðari.

Tó so. Ógjørligt er tað ikki, og eitt nú hevur Brøndby áður megnað at vent eini at síggja til vónleysari støðu móti týskum liðum.

Júst Brøndby var hitt danska liðið í UEFA-Cup kappingini, og teir gulu og bláu fingu eitt flott úrslit við sær á heimferðini.

Dysturin hjá teimum var á útivølli móti Parma, og alt tóktist ganga skeiva vegin, tá Anton Johansen í fyrsta minuttinum var somikið óheppin í eini takling, at bólturin sigldi upp um Mogens Krogh í málinum.

Brøndby gavst tó ikki á hondum, og eitt skifti í fyrra hálvleiki spældu teir seg væl fram eftir vøllinum, men nýtsla fekst tó ikki burtur úr nøkrum málmøguleika.

Hinvegin hevði Parma eisini nakað at skula sagt, og við eitt sindur av hepni kundu teir eisini havt avgjørt dystin báðu megin steðgin, men antin vóru royndirnar ov óneyvar, ella stóð Krogh júst har, sum tørvur var á honum.

Tað líktist einum teprum heimasigri, men í seinasta minuttinum fingu danir so løn fyri stríðið. Peter Madsen stútaði móti málinum, og tá Junior á mállinjuni nýtti hondina at bjarga við, var dómarin eirindaleysur. Reytt kort til brasiliumannin og brotsspark til Brøndby. Eitt brotsspark, sum Krister Nordin setti trygt í netið, og harvið gav felagið sínum eitt sera gott útgangsstøði undan seinna dystinum.



# Avgerandi í oddi og botni

**Skal VB koma í nær námind oddaliðnum úr Vestmanna, er helst neyðugt hjá vágbingunum at gera ein vørr, tá tær leygardagin fara til Vestmanna. Á Giljanesi fara tvey av botnliðunum at takast**

UPPTAKT - KVINNUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnunum, so verður talan um tríggjar dystir í bestu hondbóltsdeildini hjá kvinnum.

### Seinasta útkall

Fyrstur av hesum verður dysturin í Vestmanna, har meistararnir taka ímóti VB. Undan kappingini varð VB mett sum ein av veruligu avbjóðarunum til gullmerkini hjá VÍF, og hetta varð mest sum váttað í fyrsta dystinum, tá VÍF akkurát slapp heilskalað úr Vági.

Síðani hava úrslitini hjá liðnum tó verið rættiliga ójøvn, og meðan VÍF hevur skúgvað alla mótstøðu til viks, hevur VB tapt fyri bæði Stjørnuni og Neistanum, soleiðis at tær í løtuni eru á einum fjórða plássi. Nakað sum eisini ger VÍF til greiðan favoritt undan dystinum.

Tí er tað kanska longu nú seinasta útkall hjá VB, um tær veruliga skulu gera sær nakrar vónir um at blanda seg í oddastríðið, men skal hetta henda, er neyðugt at liðið fær glið í tað vælkenda kvika álopsspælið, sum tær áður hava verið garantur fyri, og so er tað heldur ikki nóg mikið, at tað bert er Gabriella Fekete, sum sýnir veruligt máltev.

### Botndystur á Giljanesi

Sunnudagin verður sannur botngysari á Giljanesi, tá StÍF kemur á vitjan hjá Sóljuni. Tað hevur verið sagt fleiri ferðir í ár, at tað verða innanhýsis dystirnir millum tey trý niðastu liðini, sum fara at avgera botnstríðið, og í so máta er hesin ein av seks avgerandi dystum í grundspælinum.



*VB hevur longu tapt fyri trimum liðum í ár, og tí er nú um at verða seinasta útkall, um tær skulu vinna seg fram í oddin*

Í umvendu uppgerðin vann Sóljan sín higar til einasta sigur í grundspælinum, og ætlanin er ivaleyst at endurtaka hendan. StÍF fer tó uttan iva at gera mótstøðu, og í øllum førum verður uppgávan hjá heimaliðnum torførari, nú Alina Olaru aftur á tøk hjá getunum.

Seinni dysturin sunnudagin verður á Hálsi í Havn, og eins og hjá monnunum, so er Neistin risa stórur favorittur at vinna lokaluppgerðina móti Kyndli.

Fyrri dysturin millum liðini endaði við stórsigri til Neistan, og sum støðan er í løtuni, er vónin hjá Kyndli helst at avmarka málmunin hesaferð.

## Hondbólturin um vikuskiftið

1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.11 | 14.30 | VÍF-VB | Poli/Jústines |
| 25.11 | 14.30 | Neistin-Kyndil | Kári/Trúgvi |
| 25.11 | 15.00 | Sóljan-StÍF | Hjalmar/Kristian |

1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.11 | 16.00 | H71-StÍF | Hjalmar/Kristian |
| 25.11 | 16.00 | Neistin-Kyndil | Kári/Trúgvi |
| 25.11 | 16.00 | VÍF-KÍF | Hannis/Uni |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 185 | 110 | 75 | 12 |
| 2 | Stjørnan | 7 | 6 - 0 - 1 | 205 | 155 | 50 | 12 |
| 3 | Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 162 | 138 | 24 | 10 |
| 4 | VB | 7 | 4 - 0 - 3 | 178 | 166 | 12 | 8 |
| 5 | Kyndil | 7 | 1 - 0 - 6 | 162 | 205 | -43 | 2 |
| 6 | StÍF | 7 | 1 - 0 - 6 | 124 | 183 | -59 | 2 |
| 7 | Sóljan | 7 | 1 - 0 - 6 | 147 | 206 | -59 | 2 |

## Støðan 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 7 | 5 - 2 - 0 | 201 | 185 | 16 | 12 |
| 2 | VÍF | 6 | 5 - 1 - 0 | 179 | 140 | 39 | 11 |
| 3 | H71 | 7 | 4 - 0 - 3 | 190 | 189 | 1 | 8 |
| 4 | StÍF | 7 | 3 - 1 - 3 | 193 | 190 | 3 | 7 |
| 5 | Tjaldur | 7 | 2 - 1 - 4 | 165 | 176 | -11 | 5 |
| 6 | KÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 171 | 198 | -27 | 3 |
| 7 | Kyndil | 7 | 1 - 0 - 6 | 161 | 182 | -21 | 2 |

# Tvær lokal-uppgerðir

**Fult program er í hondbóltskappingini hjá monnum hetta vikuskiftið, og millum annað verður talan um lokaluppgerðir í bæði Havn og Vestmanna**

UPPTAKT - MENN
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir verða í bestu mansdeildini hetta vikuskiftið.

Tann á pappírinum mest áhugaverdi av hesum er ivaleyst tann á Hálsi í Havn leygardagin, tá H71 fær vitjan av StÍF. Hesi bæði liðini stríðast í løtuni um triðja plássið á stigatalvuni, og har eru hoyvíkingar í løtuni frammanfyri, tó at talan bert er um eittans stig, sum eisini hevði dottið burtur, um stigini vórðu hálvbýtt her og nú.

Tí ræður sjálvandi um hjá báðum pørtum at vinna sær stig, og mett eftir seinastu avrikunum, so mugu strandingar roknast sum favorittar, eftir at teir mikukvøldið vórðu bert næsta liðið í ár, sum tók stig frá Neistanum. Hinvegin krevur hetta av strandingum, at teir vísa meira støðugt spæl, tí tú røkkur ikki nøkrum oddasessi við at vinna stig móti oddinum, fyri síðani at tveita tey burtur móti botninum.

Hoyvíkingar hava heldur ikki havt tann stóra stabilitetin í sínum spæli, og kemst hetta helst av, at teir í vetur hava spælt eitt at kalla nýtt lið saman. Við somikið frægum skjúttum sum Hallgir, Bjarna og Finni og liðnum, er tað tó helst bert ein spurningur um tíð, áðrenn veruligt glið kemur á, og hoyvíkingar hava helst einki ímóti, at hetta verður leygardagin.

### Tvær lokaluppgerðir

Sunnudagin verða so tveir dystir á skránni, og í báðum førum er talan um lokaluppgerðir.



*sjáldan – um nakran tíð - at Neistin hevur verið so stórur favorittur móti grannunum, sum teir eru hesaferð*

Í Havn fara Neistin og Kyndil at dystast, og tað man vera langt síðani – um nakran tíð - at Neistin hevur verið so stórur favorittur móti grannunum, sum teir eru hesaferð.

Neistin hevur hildið seg í oddinum tað, sum farið er av kappingarárinum, meðan Kyndil í løtuni er á niðasta sessinum, so alt annað enn ein tryggur neistasigur má sigast at vera sera óvæntað.

Somuleiðis eru vestmenningar favorittar, tá teir sunnudagin taka ímóti KÍF. Fyrri dysturin millum liðini endaði við tryggum sigri til vestmenningar, og tað eru eisini tveimum stigum, sum farið verður eftir sunnudagin. Hinvegin hava kollfirðingar áður víst, at teir væl kunnu geva nøkur gleps frá sær, og so er spurningurin, um eitt av hesum verður sunnudagin.